# Av øllum tí góða Várharra gav

Vatnið er størsta gávan, Várharra hevur givið mannættini, verður ofta tikið til. Uttan vatn var einki lív. So einfalt er tað. Tí verður tað heldur vatn enn olja ella málmur av ymsum slagi, eitt komandi stríð fer at standa um í Miðeystri



Sýrar høvdu eftirlit við eystaru síðu á Genesaretvatninum. Ísraelska kibbutzin beint undir kanónmunnanum á myndini var eitt ógvuliga ótrygt stað at búgva í, tí skotið varð í heilum niður yvir bygdina

FERÐAFRÁSØGN

*Orð og myndir*
*Edvard Joensen*
*Galilea*

**9. partur**

Kanónirnar uppi á Golan heyggjunum vitna enn um tað kríggj, sum her var um lív ella deyða fyri tey, sum her búðu fyri næstan 40 árum síðan. Lívið fyri nógv fleiri enn tey fólkini, her vóru, tá ein hevur í huga tann týdning, økið hevur fyri vatnveitingina hjá Ísrael í dag.

Men allastaðni síggjast vitnisburðir um, hvussu stóran týdning vatnið hevur fyri tilveruna alla. Vatn, sum hjá okkum bara rennur í havið, og vit annars grenja um, tí hagin og bøurin eru ov vátir. Hetta hevur heilt annan týdning her.

Tað standa nakrir stórir, innanholaðir steinar í túninum uttan fyri kapellið í Tabgha. Heilt týðuligt er, at teir eru tilevnaðir av mannahond.

Her kann eingin ivi vera. Her stendur tú framman fyri teimum kendu vatnskerunum, sum brúkt vórðu í fornøldini til seremoniella reisning og annað brúk hjá jødunum.

Mær renna í huga reglurnar, vit plagdu at kvøða úr Santa Simeon á føstulavint, tá jólini vórðu tald: »Seks var de stenkar, som var sat i Kana i Galilea.« Hetta eru tey. Als eingin ivi um tað.

Teir eru rímiliga stórir, hesir steinarnir, sum her standa. Høgt er innan úr frá miðuni og úteftir, er líkt til. Kundi sæð út til, at tá komið er so mikið væl áleiðis, at ein ávís nøgd gongur í, eru teir givnir at høgga.

Jóhannus sigur frá, at vatnskerini í Kána tóku tvær ella tríggjar kannur hvør.

Ella kanska er her bara so mikið tikið burtur úr nú, at teir, við teimum hjálpartólum ella manning, ið var til taks, hava klárað at flutt steinin hagar, ætlanin hevur verið at brúkt hann. Í hvussu er sær út til, at teir kunnu hava havt ætlanir um at høgt víðari, men av einihvørji grund eru givnir.

Men hava steinarnir í Kána verið so stórir sum hesir, kann tað hava verið eitt rættiliga stórt brúdleyp, og gestirnir kortini hava fingið so mikið, at tað tók at mæla fyri teimum, og tey rættiliga fóru upp á gólv.

Her niðri við Genesaretvatnið hevur eingin trupulleki verið at fingið vatn at latið í hesi vatnskerini, sum her standa. Tað verið seg til matgerð, vask, áðrenn farið varð í synagoguna, ella annað fyritakssemi, sum kravdi vatn.




*Beint út fyri strondini her gekk Jesus á vatninum, greiddi bátaeigarin her frá. Tað varð ikki hildið nakað serligt um at fara á flot við súkklubáti. Reiðarin hevði roynt at gjørt staðið eitt sindur altjóða merkt við at vísa við pílum, í hvørja ætt ymisk lond lógu*

## Í oyðimørkum

»Í oyðimørkum fram við vatnsins strendur, so hugagóð ein mannamúgva stendur«, syngur Mikkjal á Ryggi um ta ferðina, tá breyðundurið varð gjørt her á leiðini.

Men aftur undrast tú á, hvar hendan oyðimørkin hevur verið. Her var bygt bæði sunnan fyri og norðanfyri. Her lógu bygdir, har nógv lív var í fiskahúsunum, sum tóku í móti veiðuni frá teimum, sum royndu at lívbjarga sær á vatninum. Vit kenna so nøvnini á í minsta lagi fýra teirra, sum eftir sum sagt verður, róðu út júst av hesum staðnum, her vit standa.

Tí er tað heldur enn ikki freistandi at halda uppá, at heldur man tað hava verið hinumegin vatnið, hetta er hent, hóast hesir »frommu« menn, sum her ganga, beinleiðis vísa á steinin, har fiskar og breyð vórðu løgd og vælsignað.

Og her kann neyvan hava verið so nógv oyðimørk fram við vatninum. Tí her hevur fólk búð, og eingin ivi er um, at tey eisini hava velt. Og vatn hava tey fingið til velturnar. Um tað so hevur verið pumpað ella helst borið, so hava tey brúkt tað.

Eg taki ein faldara, sum liggur í kirkjuni, og stingi niður í fototaskuna. Hann er skrivaður av eini týskari nunnu og prentaður á enskum máli í Jerusalem. Góður at hava at skeita í, um okkurt fer burturímillum, tá greiðast skal frá vitjanini seinni.





*Seks vóru vatnskerini, sum fylt vórðu í Kána í Galilea. Uttan iva hava tey líkst hesum, sum høgt er úr heilum steini og stendur uttan fyri kirkjuna, ið bygd er til minnis um breyðundurið í Tabgha*



*Á Golan. Landbúnaðurin hevur brúk fyri nógvum vatni. Ikki kemur tað altíð av himni, tá brúk er fyri tí, og má tí fáast kunstiga á velturna*




*Tað er, sum uppslagið vísir, góð grund hjá ísraelsmonnum at halda fast um Golanheyggjarnar*

## Fram við vatnsins strendur

Hinumegin vatnið er ein stuttleikagarður, har til ber at leiga sær ein bát at rógva ein túr á vatninum við, greiðir ferðaleiðarin frá. Vit gera beinanveg av, at tað skal roynast. Tað er sjálvsagt, tí hetta er ein upplagdur møguleiki at uppliva kensluna, nú ein er á »rætta staðnum.«

Men tann stuttleikin hvarv sum døgg fyri sól, tá vit sóu, hvat tað var, tey høvdu at bjóða at flóta í.

Nakrir sonevndi »súkklubátar« úr plastikki, sum ein sær á knædjúpu tjørnini í Tivoli í Keypmannahavn ella á Vatnsoyrasandi, tá summarlegurnar eru í Zarepta.

Nei, hetta var ikki far at fara á flot á Genesaretvatni í. Her skuldi annað til, um kenslan av at hava flotið á hesum kenda vatninum skuldi vera til staðar.

Men eigarin var ikki fyri ongum kortini. Fóru vit ikki á flot, vildi hann ógvuliga fegin hava okkum at royna ein ríðitúr niðan á Golanheyggjarnar aftan fyri her, vit stóðu.

Nei, tað var heldur ikki nakað, ið kundi freista soleiðis. Men lukka í hann, so ágangandi er. Nú vil hann sleppa at siga frá um ta ferðina, tá Jesus kom til gongu eftir vatninum. Tað var beint her út fyri, sigur hann, og eg fari at frykta fyri, at hann nú vil hava okkum at royna tað eisini, nú vit hvørki fingust at súkkla á sjónum ella ríða í fjallalendinum. Þengar tykist hann kortini vilja hava frá okkum so ella so, hóast hann er ógvuliga blíður.

Mær rennur til hugs søguna um mannin, sum skuldi siga, tá hann hoyrdi prísirnar, arabararnir her á leiðini tóku fyri ferjuflutning um vatnið, at hann skilti væl, at ein ávísur harri heldur valdi at fara til gongu yvirum.

Men alt endar við, at hesin ágangandi maðurin er so blíður, at tá vit fara, fáa vit ein fullan beriposa av dykkjuvørum við, sum hann vil bjóða okkum fyri einki, av tí at hann ikki hevði teir bátarnar, vit kundu hugsað okkum.

## Vatnkríggj

Kríggj hevur mangan verið á leiðini, og verður eitt nýtt kríggj, verður tað hvørki um olju ella land sum so, væntar ferðaleiðarin. Tað verður um eitt so týðandi tilfeingi sum vatn.

Vit koyra haðani og niðan millum Golanheyggjarnar. Her eru leivdir frá seksdaga krígnum framvegis at síggja. Og eina teirra skulu vit vitja, áðrenn vit fara víðari longri inn í landið og norður móti markinum millum Ísrael, Jordan og Sýria, greiðir ferðaleiðarin frá.

Vit koyra út móti røðini, sum vendir oman móti Genesaretvatninum. Steðga á við eitt hvílipláss, har hús við kiosk og matstovu er bygt. Her er gott hjá ferðafólki at sita og líta oman yvir vatnið og landið báðumegin við. Vatni er jú ikki so breitt, so væl sæst yvirum, hóast tað í dag er nakað támut.

Hiðani er lætt at síggja, hví ísraelsmenn í síni tíð tóku Golanheyggjarnar og fyri alt ikki vilja av við teir aftur.

Her stendur ein gomul kanón. Stór er hon ikki, Kanska meira ein stór maskinbyrsa, sum varðveitt er frá teirri tíðini, tá sýrar høvdu efirlit við umráðnum.

Teir høvdu støð her, og beint undir okkum niðri við strondina, var ein ísraelsk kibbutz, sum sýrar mestsum høvdu til fragd at skjóta eftir. Øllum, sum rørdi seg, varð skotið eftir, so tað var beinleiðis lívshættisligt hjá niðursetufólkinum at fara útum. Og at fáa hjálp við báti um vatnið var líka ringt, tí har varð eisini skotið.

So tað var bara ein máti at loysa trupulleikan uppá. Tað var stutt og greitt at taka alt lendið, sum tað var, nógvar kilometrar inn í landið.

Men tað stóð á, tí sýrar komu við stórum heri og kroystu ein undirmálara av eini ísrealskari herdeild rættiliga nógv, áðrenn teir við snildum fingu borið so í bandi, at eydnan vendi, og hjálpin fekk tíð at koma fram. Men so varð aftur fyri farið til verka, so tað merktist. Og enn bjóða sýrar ikki til at koma afturíaftur.

Á veg aftur til bilin síggja vit eina høvuðsgrund til, at ísraelsmenn ikki vilja av aftur við Golanheyggjarnar.

Tað hondur eitt uppslag á vegginum, sum sigur frá, at Golan er uppruni til ein triðing av vatnveitingini hjá Ísrael. Soleiðis. Tað liggja vatnleiðingar allan vegin hiðani frá Genesaret og heilt suður í Negev oyðimørkina.

Hetta er mál, sum til ber at skilja.